# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



15.januar fingu Lív Gregersen og Aron Olsen, Odense ein son. Hann vigaði 4260 gram og var 55 cm.

5. januar fingu Randi Samsonsen, Tórshavn og Mark Jiménez, Barcelona, eina dóttur á Kolding sjúkrahúsi. Hon var 52 cm. long og vigaði 3530 gr.

10. januar fingu Barbara Vestergaard og Sigmund Ludvig, Keypmannahavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3900 gr.

11. januar fingu Mette og Leif Jacobsen, Klaksvík, ein son. Hann var 47 cm. langur og vigaði 2600 gr.

11. januar fingu Heidi og Bogi Olsen, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4350 gr.

12. januar fingu Julianna Rasmussen og Daniel Jacob Strømsten, Syðrugøta, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3500 gr.

12. januar fingu Anna Maria og Jakob Duus Miðgerð í Morud á Fyn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3780 gr.

12. januar fingu Maria og Pól Niklái Thorkildshøj, Hósvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4200 gr.

12. januar fingu Annika Djurhuus og Øssur Hammer, Søldarfjørður, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3200 gr.

15. januar fingu Jenny Hansen, Norðragøta og Atli Gregersen, Keypmannahavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3820 gr.

16. januar fingu Aslaug Joensen og Arnbjørn í Smiðjuni, Fámjin, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3710 gr.

16. januar fingu Srina Augustinussen og Hans Andreas Thomsen, Vágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3620 gr.

16. januar fingu Inga Thorkildshøj, Tórshavn og Eli Müller, Vestmanna, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3800 gr.

17. januar fingu Anja Soon Madsen, Kvívík og Arni Mouritsen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

17. januar fingu Hjørdis Árnadóttir og Bogi í Gil, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3600 gr.

17. januar fingu Reigun og Jens Hammer, Syðrugøta, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3750 gr.

18. januar fingu Annette Sørensen og Hans Jákup Ellingsgaard, Glyvrar, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3250 gr.

18. januar fingu Tórunn Holm, Hvalba og Petur Frank Joensen, Vestmanna, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3650 gr.

18. januar fingu Katrin Didriksen Apol, Tórshavn og Aksel Vilhelmson Johannesen, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3850 gr.

19. januar fingu Ann og Rósing Thomsen, Strendur, eina dóttur. hon var 54 cm. long og vigaði 3700 gr.

## Nøkur minningarorð um Karin Joensen í Fuglafirði



Tann 7. desember andaðist Karin, 100 ára gomul.

Karin var fødd og uppvaksin niðri við Gjógvará. Hon var dóttir Katrinu og Líggjas, tann tiltikna raska útróðrarmannin. Tað hendi seg meira enn eina ferð og tvær ferðina at fyri at bjarga línuni, máttu hann krøkja fiskin og kasta hann út aftur. Tá høvdu teir fulla last og nógv á dekkinum.

Í mínum uppvøkstri hevði eg trý hús, ið vóru nærgrannar. Tey vóru: Jóhannus í Lon við familju, Hans á Geilini við familju og Karin og Elias við familju. Sannast má, at tað var ein stór gleði at hava hesi fólk til grannar. Tað fullu ongantíð nøkur skeiv orð millum húsini. Øll vóru trúðføst í móti hvørjum øðrum og hittust húsanna millum, ja, ein dýrgripur at hava tey í millum okkum.

Karin var ein av teim raskastu kvinnum, bæði til hoyna og fiskaarbeiði. Eg minniast nógv tung tøk, ið hon tók upp á seg at fullføra. Tað var oftani ein sá hana blanda betong og koyra í formarnar til garð, sum maðurin hevði stilla upp. Hetta útinti hon einsamøll. Karin var gift við Elias frá Skipanesi.

Har á garðinum, ið eg vaks upp, eru øll tey gomlu farin.

Eitt, sum sermerkti Karin, var at hon leit á sín Frelsara Jesus. Hon kundi tí millum annað syngja:

*O, Harri Jesus hoyr nú meg*
*mítt álit set eg á teg,*
*tú leið meg á tín*
*himlaveg,*
*o, tak og leið meg nú,*
*"Tak og leið meg nú".*
*Tak mítt syndatyngda*
*hjarta,*
*tak og leið meg nú!*

Tað kundi verið nógv at skriva um Karin og hinar trúfastu grannarnar, men tað má tó steðga.

Tey seinastu árini livdi Karin ikki væl, men hon hevði tað gott á Ellisheiminum í Runavík. Men nú er hon sloppin heim til sín Frelsara, ið hon elskaði, og kann tí syngja:

*Verdugt er lambið, ja,*
*verdugt er lambið,*
*leyskeypti okkum tá lívið*
*hann gav,*
*Heiður og æru vit Jesusi*
*ofra,*
*heima vit eru, nú stríðið*
*er av.*

*Har verður frøi, ja, har*
*verður frøi,*
*tí at tey frelstu øll náddu*
*havn!*
*Har verður frøi, ja, har*
*verður frøi,*
*skarin skal lovprísa*
*Frelsarans navn.*

**Símun P. Poulsen**

## Hans Jákup Michelsen 60 ár



Leygardagin 21. januar 2006 fyllir Hans Jákup Michelsen í Havn 60 ár.

Hans Jákup er havnarmaður, uppvaksin við Landavegin, har hann eisini býr og hevur sína egnu fyritøku.

Foreldrini eru Ása, f. Christiansen, og Helge Dahl Michelsen, sáli, vanliga nevndur Helge í Smæruni. Tey eru fimm systkin, Kirstin, sum býr í Danmark, Hans Jákup, Vagnur, Torbjørn og Leivur, sum allir búgva í Havn.

Hans Jákup er útbúgvin radiomekanikari, lærdi hjá Olivur Næss við Hoydalsvegin. Longu sum lærlingur sást, at hann hevði sera góð evnir og gott handalag, og tí varð hann skjótt álitið á radiomerkstaðnum. Hann er tann, sum kennir mest til og veit mest um biltelefonir í Føroyum.

Hans Jákup arbeiddi hjá Olivur Næss til 1978, tá hann yvirtók umboðini fyri Storno telefonir og Blaupunkt bilradio, og byrjaði sína egnu fyritøku við handli og verkstaði.

Hann letur eitt nú telefonskipanir til tilbúgving og bjarging, sum t.d. í Vágatunlinum, og aftur nú sást hann gera uppmátingar í samband við Norðoyartunnilin.

Men Hans Jákup er annað enn bert arbeiði og fagligt dugnasemi. Fyri Landavegin og alt umhvørvið har hevur hann verið ein savnandi og mennandi kraft. Ein, sum altíð hevur hugsað um felagsskapin og gjørt sítt til at halda lív í felagsskapinum.

Hann hevur eisini bát og er limur í Bátafelagnum í Havn, er limur í Føroya Ellisakførum og eigur motorsúkklu og ein gamlan Ford Anglia, eisini er hann virkin limur í Kiwanis Tórshavn, har hann er kassameistari og hevur roknskapin. Hann er ein ógvuliga disciplineraður maður og gongur nógv túrar til fastar tíðir á degum.

Hans Jákup er giftur Gunhild, f. Simonsen, úr Havn. Tey eiga børnini: Helgi, sum býr í Havn, og Hildur, sum býr í Vestmanna. Gunhild eigur eisini sonin Hallur, sum býr í Danmark.

Tey, sum kenna Hans Jákup, vita, at tú altíð kanst stóla uppá hann. Hjá honum er eitt orð eitt orð, ein maður ein maður. Hevur tú gjørt eina avtalu við hann, so heldur hon. Og hann krevur eisini, at hini halda orð. Hetta er bara ein av mongu góðu eginleikunum hjá honum, og sum eisini hava gjørt sítt til, at onnur hava virðing fyri honum og hansara dugnaskapi og fakligu professionalismu, og orsøk til, at hann hevur klárað at bygt upp eina so solida fyritøku.

**Prógv**

**Gunnvá Sniðálvsdóttir á Lofti**, hevur tann 13. januar 2006 á Universitetinum í Århus, lokið prógv sum løgfrøðingur.

**Jørgen Johansen, Hoyvík**, hevur tann 12. januar lokið prógv sum byggifrøðingur á Vitus Bering CVU í Horsens.

13. oktober 2005 var **Gisli Sveinbjørnsson, Nes Hvalba**, avlærdur sum elektrikkari, hann hevur staðið í læru hjá Gudmund Larsen, Vágur. Lærumeistari var Eliesar Hansen.

**70 ár**

Mikudagin 18. januar varð Anna Saltnes, 70 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 21. januar frá kl. 15.00-20.00.

**Brúdleyp**

Hósdagin 19. januar 2006 giftust í Havn, Agnas Jakobsen og Eyðálvur M. Joensen.

**Gullbrúdleyp**

Sunnudagin 22. februar hava Herborg og Jóhan Petur Petersen, Norðskála, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin uppi hjá Birtu og Kent aftaná kl. 17.00.

**Prógv**



Í dag 20. januar 2006 hevur **Helena Holm av Tvøroyri** lokið prógv sum Bachelor í námsfrøði á Københavns Pedagog Seminarium.